Álit

í

løgtingsmáli nr. 75/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Búskapargrunn Føroya (Fylgilóg til skiftisskipan at gera føroyska búskapin og fíggjarlóg landsins óheft av ríkisveitingini)

Kristina Háfoss, Høgni Hoydal, Sirið Stenberg, Bjørt Samuelsen, Beinta Løwe Jacobsen og Hervør Pálsdóttir, tingmenn, hava vegna Tjóðveldi lagt málið fram 20. januar 2021, og eftir 1. viðgerð 17. februar 2021 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. mars og 8. apríl 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Búskaparráðið, Landsbankan og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen, Bill Justinussen og Aksel V. Johannesen) tekur ikki undir við málinum, men hevur ymiskar viðmerkingar.

Magnus Rasmussen, Jákup Mikkelsen og Bill Justinussen hava hesar viðmerkingar:

Avtala varð gjørd við donsku stjórnina um ríkislóg fyri heildarveiting fyri 2016-2019, har heildarveitingin í tíðarskeiðnum varð fastfryst á 2015-stigi, t.e. 641,8 mió. kr.

Tí kann tað tykjast marghátligt, at flokkur, sum sjálvur hevur tikið undir við at fastfrysta heildarveitingina, meðan hann sat í landsstýri fyri stuttari tíð síðan, nú vil sleppa sær av við ríkisveitingina.

Sitandi samgonga ætlar, at heildarveitingin framhaldandi skal vera fastfryst, og tí er sama upphædd ásett fyri árini 2020 og frameftir, t.e. 641,8 mió.kr.

Undirritaðu halda seg til avtaluna í samgonguni og taka tí ikki undir við lóg um broyting um Búskapargrunn Føroya, sum er ein fylgilóg til skiftisskipan at gera føroyska búskapin og fíggjarlóg landsins óheft av ríkisveitingini.

Aksel V. Johannesen hevur hesar viðmerkingar:

Undirritaði tekur ikki undir við uppskotinum. Skal ríkisveitingin lækkast, eigur hetta ikki at ganga út yvir grundleggjandi vælferðartænastur ella livikorini hjá miðalhampa føroyinginum.

Skal fortreytin fyri einum sjálvberandi búskapi vera til staðar krevst, at vit føra ein ábyrgdarfullan og skynsaman fíggjarpolitikk. Undanfarna samgonga hevði eitt samlað yvirskot á 1,5 mia. kr. seinasta valskeið. Lán vórðu niðurgoldin og peningur varð settur í búskapargrunn. Hetta við tí endamáli at tryggja haldførið í búskapinum og hjá landskassanum, at vit høvdu nakað at standa ímóti við, tá vit fóru at verða rakt av niðurgangstíðum.

Um sæð verður burtur frá eingangsútreiðslum í sambandi við koronu, hevur sitandi samgonga hesar fyrstu 18-19 mánaðirnar av valskeiðnum økt raksturin við áleið 600 mió. kr., økt íløgurnar við næstan 200 mió. kr. og givið lættar á inntøkusíðuni á umleið 150 mió. kr. Sostatt er landskassin farin frá einum yvirskoti á slaka hálva milliard í 2019 til eitt undirskot.

Tá tað ikki verður førdur ein ábyrgdarfullur og skynsamur fíggjarpolitikkur, ber tað ikki til at skerja ríkisveitingina, uttan at tað fer at ganga út yvir grundleggjandi vælferðartænastur og livikorini hjá okkum føroyingum.

Við hesum viðmerkingum tekur meirilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Páll á Reynatúgvu, Ruth Vang og Jógvan Skorheim) hevur hesar viðmerkingar:

Tað er av avgerandi týdningi fyri land okkara og fólkið her býr at skipa føroyska landshúsarhaldið á haldførum grundarlagi. Eitt samfelag sum byggir á inntøkur vunnar úr teirri vitan, tí tilfeingi og tí arbeiðsførleika, sum er fallið okkum føroyingum í lut. Sum borgarar í einum av heimsins bestu blettum.

At skipa føroyska samfelagsbúskapin á sjálvberandi grundarlagi, siga allir flokkar seg vilja. Uttan mun til, hvønn politiskan hugburð flokkarnir hava um Føroyar sum sjálvstøðugt ríki. Kortini velur ein meiriluti í nevndini at vísa útrættu hondini frá sær og at mæla til at fella uppskotið.

Búskaparliga gongdin hevur annars verið týðilig, síðani heildarveitingin varð lækkað og fastfryst fyri knøppum tjúgu árum síðani. Ongantíð í Føroya søgu hava vit sum samfelag lyft so stórum og mennandi verkætlanum. Havt so stóran og áhaldandi búskaparvøkstur. Og so nógv vaksandi fólkatal. Júst tað øvugta av tí, sum allar myrkar afturhaldskreftir spáddu, tá heildarveitingin varð lækkað.

Í miðal er bruttotjóðarúrtøkan í leypandi prísum vaksin árliga við 4,6% árini frá 1998 til 2021. Greiðar tilsipingar um, at við viljanum til sjálvbjargni fylgir eisini vøkstur. Við ábyrgd fylgir eisini framburður.

Tíðin er búgvin at finna semju um búskaparligt sjálvbjargni í Føroyum. Livistøðið í Føroyum er farið uppum tað í Danmark, og grundarlagið fyri framhaldandi at hava danska rakstrarinnspræning í føroyska samfelagið er tí ógrundað. Hinvegin bendir alt á, at donsku pengarnir í Føroyum skapa dømir um búskaparliga fyribrigdið “hollendska sjúku”, har samfelagsraksturin leggur seg á eitt ónatúrliga høgt støði í mun til framleidni í samfelagnum.

Minnilutin velur samstundis at gloppa dyrnar fyri breiðari semju, samsvarandi búskaparvøkstrinum, um at marka heildarveitingina til íløgur burturav, meðan heildarveitingin stigvíst verður tikin niður í eitt áramál.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 23. apríl 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Jógvan Skorheim	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	